SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 11 - 0 - 0 | 300 | 211 | 89 | 22 |
| 2 VB | 11 | 10 - 0 - 1 | 347 | 210 | 137 | 20 |
| 3 Neistin | 12 | 9 - 0 - 3 | 354 | 253 | 101 | 18 |
| 4 Søljan | 12 | 7 - 0 - 5 | 335 | 281 | 54 | 14 |
| 5 VÍF | 12 | 5 - 0 - 7 | 286 | 271 | 15 | 10 |
| 6 StÍF | 11 | 2 - 1 - 8 | 233 | 299 | -66 | 5 |
| 7 Kyndil | 12 | 1 - 1 - 10 | 217 | 345 | -128 | 3 |
| 8 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 190 | 392 | -202 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 329 | 289 | 40 | 10 |
| 2 Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 331 | 264 | 67 | 8 |
| 3 KÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 275 | 301 | -26 | 6 |
| 4 H71 | 1 | 0 - 0 - 1 | 327 | 327 | 0 | 5 |
| 5 StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 293 | 326 | -33 | 5 |
| 6 Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 298 | 346 | -48 | 3 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 10 | 9 - 1 | 28 | 7 | 21 | 18 |
| 2 TB | 10 | 9 - 1 | 27 | 10 | 17 | 18 |
| 3 Dráttur | 10 | 4 - 6 | 21 | 20 | 1 | 8 |
| 4 ÍF | 10 | 4 - 6 | 14 | 18 | -4 | 8 |
| 5 KÍF | 10 | 4 - 6 | 13 | 21 | -8 | 8 |
| 6 SÍ | 10 | 0 - 10 | 3 | 30 | -27 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 8 | 7 - 1 | 22 | 7 | 15 | 14 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 - 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 3 Fleyr | 8 | 5 - 3 | 18 | 12 | 6 | 10 |
| 4 Fram | 8 | 1 - 7 | 7 | 22 | -15 | 2 |
| 5 ÍF | 8 | 1 - 7 | 6 | 22 | -16 | 2 |

# Christian nærkast Manchester City

**Í hesum døgum er HB-unglingin Christian Mouritsen og foreldur hansara í Manchester saman við Jákup í Stórustovu, umboðsmanni, har tey samráðast við Manchester City, ið fegin vil hava unga framherjan**

FÓTBÓLTSSÁTTMÁLI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alt bendir á, at vit um nakrar heilt fáar dagar hava enn ein ungan føroyskan fótbóltsspælara, ið verður sáttmálabundin við eitt felag í Premier League. Talan er um 17 ára gamla Christian Mouritsen úr HB, sum Manchester City fegin vil hava fatur á.

### Verður avgjørt í vikuskiftinum

Fríggjamorgunin høvdu við umboðsmannin hjá Christiani, Jákup í Stórustovu, í telefonini, og hann váttaði, at hann var staddur í Manchester saman við Christiani og foreldrum hansara.

Tað hevur leingi verið alment, at Manchester City hevur verið áhuga í unga HB-manninum, sum serliga gjørdi vart við seg, tá ið U17-landsliðið í fjør tók lut í opnu norðurlendsku kappingini í Finlandi, har Christian gjørdist stóra hetjan, tá ið hann skoraði einsamalla málið í 1-0 sigrinum á Danmark við einum beinleiðis frísparki.

Jákup í Stórustovu sigur, at tey eru í Manchester og hyggja at umstøðunum, men enn er einki endaliga avgreitt, men tað verður tað væntandi í vikuskiftinum. Um so er, at nakað positivt spyrst burturúr, so verður tíðindafundur í Føroyum mánamorgunin, sigur Jákup í Stórustovu í telefonini úr Manchester.

Samráðingar hava eisini verið millum Manchester City og HB, men hvussu vorðið er við hesum samráðingum, eydnaðist okkum ikki at fáa at vita fríggjamorgunin, tí ikki bar til at fáa fatur á formanninum í HB.

# John fingið sáttmála í Danmark

**Fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin John Petersen skrivaði hósdagin undir sáttmála við danska 2. deildarfelagið Holstebro**

FÓTBÓLTSÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í fjør heyst flutti ein tann størsti profilurin í føroyskum fótbólti seinnu nógvu árini, John Petersen, til Danmarkar saman við familjuni. John boðaði samstundis frá, at hann nú gavst á landsliðnum. Um John fór at gera tað stóra við fótbóltin í Danmark, var ógreitt tá, men nú er so greitt, at skálamaðurin aftur fer at spæla á høgum støði.

### Galdandi til í summar

Á tíðindafundi í Holstebro hósdagin almannakunngjørdi fótbóltsfelagið Holstebro Boldklub, sum vanliga bert verður rópt HB, føroyska framherjan sum nýggjasta limin í hópinum hjá felagnum.

John Petersen og Holstebro hava gjørt ein sáttmála, ið er galdandi fram til summarfrítíðina. Sjálvur býr John í Viborg, sum liggur einar 45 minuttir í bili frá Holstebro.

Holstebro spælir í 2. deild í Danmark, sum er triðfremsta deildin í donskum fótbólti, og felagið liggur í løtuni triðaftast í kappingini, so alt bendir á, at royndirnar hjá John skulu verða við til at hjálpa Holstebro at varðveita plássið í deildini.

# Oddadystir í báðum deildunum

**Hetta vikuskiftið eru oddadystir á skránni bæði í meistaradeildini hjá kvinnum og hjá monnum í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt er upp til eitt spennandi flogbóltsvikuskifti við fleiri spennandi dystum. Hjá kvinnunum verður toppdystur í KÍ-høllini sunnudagin, har tey bæði avgjørdu oddaliðini, Mjølnir og TB, dystast.

### Generalprøvi upp á steypafinaluna

Dysturin millum Mjølnir og TB hjá kvinnunum er samstundis ein generalprøvi upp á steypafinaluna, sum verður um ein mánað, tá ið hesi bæði lið bresta saman enn einaferð.

Landskappingin í flogbólti lá still farna vikuskifti, tí tá var árliga Com-Data kappingin hjá Mjølnir á skránni. Í hesi kapping endaði tað við, at júst Mjølnir og TB endaðu í kvinnufinaluni, og tá vóru tað genturnar av Tvøroyri, sum vunnu dystin 3-1 í settum.

Vesturi í Vágum verður lokaluppgerð millum Drátt og SÍ, og her má Dráttur metast sum favorittur, og steypafinalistarnir frá í fjør hava eisini fyrimun av at hava heimavøll í lokaluppgerðini.

Seinasti dysturin í kvinnudeildini hetta vikuskiftið verður í Hoyvík, har KÍF fær vitjan av ÍF í einum dysti millum tvey av liðunum, ið liggja í niðara enda av stigatalvuni.

### Sørvingar vitja í Havn

Hjá monnunum verður ein spennandi dystur í Havn sunnudagin, tá ið oddaliðið SÍ skal vitja Fleyr, sum hevur verið ein av harðastu kappingarneytunum hjá sørvingum í ár. SÍ er nummar eitt í deildini, og fýra stig eru niður til Fleyr, sum er nummar trý. Mjølnir er nummar tvey við tveimum stigum færri enn SÍ og tveimum fleiri enn Fleyr.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum verður eisini í Havn sunnudagin, og tá eru tað tey bæði aftastu liðini, Fram og ÍF, sum hittast í Hoyvíkshøllini.

Dystir um vikuskiftið:

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16.01.05 | Kl. 14.30 | Neistin-Stjørnan | Ítróttarhøllin á Hálsi |
| 16.01.05 | Kl. 15.00 | Søljan-StÍF | Høllin á Giljanesi |
| 16.01.05 | Kl. 15.00 | VÍF-VB | Høllin í Vestmanna |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.01.05 | Kl. 16.00 | Kyndil-KÍF | Ítróttarhøllin á Hálsi |
| 15.01.05 | Kl. 16.00 | H71-StÍF | Hoyvíkshøllin |
| 16.01.05 | Kl. 16.00 | Neistin-VÍF | Ítróttarhøllin á Hálsi |

## Flogbóltur

**Meistaradeildin kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.01.05 | Kl. 13.00 | Dráttur-SÍ | Høllin á Giljanesi |
| 16.01.05 | Kl. 14.00 | Mjølnir-TB | KÍ-høllin |
| 16.01.05 | Kl. 14.00 | KÍF-ÍF | Hoyvíkshøllin |

**Meistaradeildin menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16.01.05 | Kl. 15.00 | Fleyr-SÍ | Gundadalshøllin |
| 16.01.05 | Kl. 16.00 | Fram-ÍF | Hoyvíkshøllin |